Ja, øll eiga málið



Tað evarska lítla sindrið, sum av og á verður gjørt við at evna til okkurt føroyskt stakorðið at seta upp móti teirri alsamt vaksandi flóðini av útlendskum, serliga enskamerikonskum, fær ikki góða móttøku hjá summum og má sum nógv føroyskt tjóðskaparstarv nú á døgum biðja um umbering fyri, at tað er til. Ein flokkur av landsmonnum okkara sá helst, at tilikar royndir vórðu kovdar eina ferð fyri allar. Teirra millum er ein Mia, sum ger bart í greinini »Øll eiga málið« í Sos. 3. mars. Hon fekk meg so at bróta svøvn seinnapartin sunnudagin og setast at skriva nøkur orð til aftursvar — sum bygdarmaður átti eg eftir hennara uppskrift heldur at ligið undir dýnuni: »sunnudag seinnapart á bygd« (= kvirt, keðiligt, øll sova!?!

Av tí at blaðstjórin á Sos. hevur sett nógv slitna mynd, sum hann tók av mínum lítilsverda persóni fyri seks árum síðan, oman fyri greinina, man hann hava tulkað innihaldið í henni tann vegin, at hon er stilað m.a. til mín, og takki eg honum hjartaliga fyri tann ivasama heiður. Men vildi hann sett myndir av øðrum »samsekum« í nútíð og fortíð við greinina, hevði ikki staðið á hjá honum at fylt fleiri blaðsíður í frálíka blaði sínum.

Mia skilur millum »reinsifólk« og »verjifólk«, sum hon málber seg. Hon sær hetta alt svart og hvítt. »Reinsifólkini« eru tey illu og »verjifólkini« tey góðu. Tey fyrru eru eftir øllum fremmandum, serliga donskum, og telja knúska tað og kista burtur, tey seinnu verja málið fyri álopunum frá »reinsifólkunum«. Alt, sum uttaneftir er komið, fær skjól undir teirra verndarveingi uttan tað, sum er »stolið« úr íslendskum — tað skirir hon »tjóvagóðs«.

Vit her á landi eru mong fongd við ta ranghugsan at skapa okkum lidnar, fastrunnar myndir av mótstøðufólki, sum vit halda vera. Tey og tey *eru* soleiðis, tí soleiðis *eiga* tey nú einaferð at vera í svart-hvíta hugaheimi okkara. Fyri mín part kann eg siga, at eg ferð eftir ferð havi roynt at vísa á, at fremmandaorðum hvørki kunnu ella eiga vit at sleppa frá, men vit eiga fyri tað ikki at leggja burtur hin aldargamla háttin at endurnýggja orðfeingi okkara við at royna, har sum til ber, at gera nýtt burtur úr heimligum máltilfari. Men vit verða eyðvitað at hava hógv og sýna góðan ans. Hættirnir eru í stórum trinnanda: 1) at geva gomlum, ofta hálvgloymdum orðum nýggja merking, 2) at týða fremmandaorðið, og er tað samansett, tá ofta lið fyri lið og 3) at gera nýggj orð, annaðhvørt við samansetning ella avleiðslu. Royna vit ikki at halda lív í hesum endurnýggjanarhátti, men sleppa honum av hondum, kann vandi brádliga verða fyri, at fremmandaorðini verða so mong í tali, at tey fara at seta ov grefligan dám á málheildina. Til verju fyri hesum sjónarmiði hevur eisini verið ført fram, at orðini soleiðis mangan kunnu vera gjøgnumskygdari og ti flestum eyðskildari enn mong teirra fremmandu. Ljóðstøðuliga (fonotaktiskt) samtykkja tey eisini betur við málið.

Í skandinaviskum londum gremja tey seg illa um ensku óløgini, sum leggja inn yvir málið, men tað tykir, sum so lítið gerst við tað, júst tí at venjingin við at skapa burtur úr heimligum til at seta í staðin hevur ligið ov leingi á láni. Tað, sum ikki er »siður« longur, er torført at fáa lív í aftur, tó at vilji og hugur eru til. Tó vil eg við hesum ikki leggja hesar frændur okkara undir at hava slept endanum, men tað er so ilt at skapa ljóð fyri tí innlendska í øllum tí harðmælta útlenska ganginum. Men av og á verða royndir gjørdar at finna heimaorð í staðin fyri útlendsk. Máltátturin hjá svenska útvarpinum beyð í fjør summar til kappingar millum almenning um svenskt orð fyri tí, sum har á landi eitur »freestyle« og her er kent undir navninum »walkman«. Undirtøkan var ófør, og uppskot komu inn í hópatali, fleiri teirra væl nýtiligt, segði mær ein vinkona mín, ið hevur starvast hjá svensku málnevndini, men nú er komin í starv sum málráðgevi hjá »Dagens Nyheter«, størsta blaðnum í Svøriki. Hon var bíðin um at vera í nevndini, ið skuldi døma um uppskotini. Seinni havi eg frætt, at uppskotið, ið vinningin fekk, var *barspelare*. So er eftir at vita, um ungdómurin skoytir um tað. Ivaleyst áttu vit av og á at havt slíkar kappingar. Ja, hví ikki? Vegna málnevnd okkara lýsi eg við hesum til kappingar um føroyskt orð fyri »walkman«! Vinningur, umframt heiðurin, ein »walkman«! Uppskot verða at senda *Føroysku málnevndini, Debesartrøð, Tórshavn.*

Aftur til grein Miu. Hon sigur, at í einstøkum førum eydnast væl at gera nýggj orð, men í flestu førum illa. Hvørji hagtøl hevur hon grundað dóm sín á? Og hví er hon ikki so rættvís at nevna okkurt lítið dømi um tað, sum hon heldur hava eydnast væl?

Eftir orðavali hennara at døma, hevur hon onkuntið halgað seg málfrøðinámi, helst við meiri halli at bókmentunum. Men hon man ikki hava fylgt heilt væl við tí, sum hent er í málvísindum seinasta mansaldurin, tá ið hon ber málið saman við *livandi veru* (organismu). Henda áskoðan ráddi leingi, men er nú langt síðan farin undir heilt. Nú er hinvegin tann hugsan frammarlaga, at málið er mannskapað samfelagsfyribrigdi, og tí er fult sambæriligt at ráðleggja um mál. »Language planning« er nú eitt lykilorð hjá málrøktarfólki víða um heim, ikki síðst í londum, har sum tjóðmálini hava ikki havt nóg gott rásarúm fyri fremmandum harramálum. Nú skulu hesi mál mennast, ongantið ov skjótt, til at lúka tey krøv, ið nýggj tíð setur mentamáli. Í hesum menningararbeiði er orðasmíð sjálvsagdur táttur. Mia skal vita, at tað eru ikki bara føroyingar og íslendingar, ið eru so »heimføddir«. Tvørturímóti er tað, sum teir hóast mótstøðu og akslaypp trúliga hava gjørt í hundrað ár og meir, nú í fylsta samljóði við nútíðina og framtíðina. Heimurin vinnur lítið við, at málini gerast *ein* stórur vavgreytur. Og lítil ivi man vera um, hvørji mál, ið verða við sviðusoðið á tí fria orðamarknaði, sum Mia sýnist at hava sum hugsjón. Tað verða so vissuliga ikki tey stóru.

Tað veldst um so nógv, hvørja lagnu, ið nýtt orð fær. Summi doyggja í eggini, onnur verða aldri floygd, men so kunnu aftur onnur gerast fagrir fuglar, sum vit eru góð við og viðhvørt stolt av at siga útlendingum, at vit eiga. Koma tey til lívs, so er vist, at tey sum frá líður taka upp í seg allar tær hjámerkingar (konnotatiónir), ið loða uppi við samsvarandi orði í øðrum málum. Tað er ikki uttan ein spurningur um tíð og vælvild.

Mia hevur einki eiri í íslendskum, men tað eru góðar, gamlar snildir at kenna figginda sín, skulu vónir vera um at vinna honum neisir. Í tí máli (»latíni« Norðurlanda) man Mia hava okkurt eftir at læra, tí hon kemur í fullum álvara fram við, at føroyska nýggjyrðið *gervi* fyri »gear« skal vera íslendska orðið *kerfi*, sum onkur í skemti hevur bonglað til. Her undirmetir hon okkara mál- og stilmeistara Heðin Brú, tí mær vitandi (rætti meg tann, ið betur veit!) var hann fyrstur at nýta orðið *gervi* á prenti. Tað er í søguni »Avstaðferðini« í savninum *Purkhúsi* (1966): »Hvørja ferð bilstjórin skifti *gervi*, noyddist hann, sum næstur sat, at lyfta lærið«. Hetta er norrønt fornorð, nærskylt fornenskum *gearwe*, sum nýenskt *gear* er ættað beint niður frá. Hetta er roynd at finna orð, sum ljóðstøðuliga ber føroyskum betur enn hitt óvirkiligara enska orðið *gear*, ið samtykkir illa við føroyska stavseting og framburð. Íslendingar hava tikið nýenska orðið upp, men stavað tað um til *gír*. At skrivað orðið *»gír«* á føroyskum hevði ikki borið so væl til, tí at *g* í hesi støðu eftir reglunum sigur *»gj«* í vanligum føroyskum orðum. Sum er, mega vit hjálpast at skriva orðið á enskan hátt. Summi halda, at tað er í lagi, onnur, at tað lýtir. Tað fagurfrøðiliga (estetiska) er eisini ein týðandi táttur í hesum, vit nevna málrøkt. Um orðið *gervi* hevur livsvónir, vita vit ikki, men tað er so til sum ein valkostur hjá teimum, sum vilja nýta tað — málrøkt er eisini ein spurningur um vilja. Orðið *kervi*, sum Mia fløkir upp í henda vavsturin hjá sær, er gamalt arvorð í føroyskum eins væl og í íslendskum, norskum, svenskum og donskum, og er tí eingin tjóvafoli. Okkara orð *kervi* merkir »bundi av støri« — støru er grovvaksið grasslag, sum varð havt til at flætta tægur og mettur úr. Í íslendskum hevur orðið fingið nýmerkingina »system«, og ta merking hava summir rættiliga tíðliga eisini givið føroyska orðinum eftir íslendskari fyrimynd. Bjarni Niclasen skrivar t.d. um *sólkervi* í bókini *Rúmdin* (1961). *Vegakervi* hevur leingi verið fast orð hjá landsverkfrøðinginum.

Mia heldur, at *ljómfloga* er vanskapt orð. Nú er so ymist, sum eygu siggja. Tað vil so tíl, at eg eri »faðir« at hesum orði, og eg dugi nú einki vanskapt at siggja við hesum »alva« mínum, men kráku tykir sum kunnugt best um unga sín! Tað sýnist, sum fleiri unglingar, ið geva út tónaløg, einki hava ímóti orðinum; tað kann valla annað vera, enn at tað er komið í tørvi, so skjótt tað »slóð igjøgnum«. Annars varð tað gjørt eftir áheitan. Tað var Sonni Smith útvarpsmaður, sum á sinni bað meg royna at finna snøgt orð fyri »compact disk«. Tá var hetta plátuslagið spildurnýtt og ikki komið í handlarnar enn. Tað fyrsta, ið mær rann í hug, var *geislapláta* ella *geisladiskur*, tí at tað er geisl (laser), ið kallar fram ljóðið eins og nálin av gomlu plátunum. Til stuttleika tók eg og ringdi til formannin fyri íslendsku málnevndini, Baldur Jónsson professara, at spyrja, hvat orð íslendingar vóru komnir framá, men hann segði seg ikki hava frætt um hesar nýggju plátur. Eg segði honum so, hvat eg hevði hugsað mær, og leitst honum ikki illa á orðið, helt eg meg skilja á honum. Hann lovaði at spyrja hjá kønum fólki, men svarið var, at hetta var alt so nýtt, at eingin hevði enn hugsað um íslendskt heiti. Satt at siga var eg ikki fullnøgdur við fyrra úrslit mítt, helst tí, at orðið *diskur* longu var tránýtt, eitt nú í teldumáli (t.d. *harðdiskur*), og burtur úr tí høvdu vit longu gjørt avleidda orðið *diskil* fyri »diskette«. (Hetta var als ikki tí, at eg hevði nakað inni við orðið, sum eins og Mia av røttum sigur, kennist fullføroyskt, tó at rótin liggur afturí grikskum). Tá kom orðið *fløga* fram fyri meg. Vit, sum hava verið við til at binda hoybyrðar, vita hvat ein *fløga* er (í orðabókini stendur *floa*, men nýggjari rannsóknir hava sýnt, at tað er ikki upprunafrøðiliga rætt stavsett). Tað er ein av teimum »plátum«, ið verða tiknar av *fløgugingnari* ella *fløgurunnari* sátu, rullaðar saman sum pannukøka og lagdar á reipið. Tvær ella triggjar slíkar fløgur ganga í byrðina. Tó at eg kanska seti meg í vanda fyri at verða til láturs, skal eg kortini nevna tað her, at hugmyndasambandið við »compact disk« kom av tí, at fløgurunnin sáta er væl sjaknað og hoyggið tí tætt samanrunnið ella -stappað, t.e. »kompakt«! Á hesar smáu plátur er nógv tilfar samankroyst. Sonna tóktist dáma orðið væl, og tað fór so smátt at koma fram. Eg minnist, at eg segði við hann, at tó at *ljómfløga* var ætlað til at vera sjálvt orðið, bar væl til at stytta tað, og siga bara *fløga* í hópi, har sum eingin misfatan kundi hugsast at vera. Tí ber til at siga *fløguspælari* eins væl og *diskspælari*, sum Mia skjýtur upp. Eingin orsøk er til at kalla tað *ljómfløguleikstól*«, sum Mia spyr við illa fjaldum háði, um tað skal eita. Men hatta kenna vit so væl: nýggj føroysk orð skulu vera long og bulvirkin, sum skemtorðið »steinoljuskvettitólsluftinnkroystari« skal vera dømi um! Til stuttleika kann eg skoyta uppi, at hetta nýggja plátuslagið nú eitur *geisladiskur* (stutt sagt *diskur*) á íslendskum. So vinarráð Miu um at kalla »compact disk« DISK kundu komið henni aftur um brekku: onkur kundi hildið tað verið íslendskt »tjóvagóðs«!

Tann góða Mia er ikki sør fyri at siga sær sjálvari ímóti, tá ið hon skrivar: »Úrvalið av orðum kann aldri bliva nóg stórt«, samtíðis sum hon

➧